# ítróttur

Nr. 59 • hósdagur • 23. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Tær bestu føroysku kappast við tær bestu í heiminum

**Trý føroysk gentulið í fimleiki fóru fyrst í vikuni til Tallin í Estlandi, har tey skulu kappast um heimsmeistaraheitið í estetiskum fimleiki. Talan er um gentulið frá Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósinum**


FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*




*Føroyskir fimleikarar eru við í HM í estetiskum fimleiki, sum verður hildið í Talinn í hesum døgum*

Hetta er fyrsta ferðin at so nógv lið úr Føroyum luttaka í hesari kapping. Gentuliðið úr Havnar Fimleikafelag var sum vinnari av stórkappingini við í fjør, og eydnaðist hetta so væl, at fimlekasambandið gjørdi av at senda trý lið avstað í ár.

Estetiskur fimleikur er so nýggjur í Føroyum, at tað er sera umráðandi, at føroysku fimleikararnir sleppa at síggja, hvat tað er fyri ein ítróttargrein, tær nú eru partur av, og hvat tær hava at liva upp til, um tær vilja vera bestar.

Ferðalagið úr Føroyum fór avstað týsdagin, komu til Tallin mikudagin, og inn-leiðandi kappingin verður fríggjadagin, har øll føroysku liðini skulu kappast. Við í kappingini eru 22 lið, sum koma frá londum: Russlandi, Kanada, Kekkia, Finnlandi, Spaniu, Estlandi, Danmark, Ukraina og Føroyum.

Dagin eftir er so finalan á skránni, har tey bestu liðini frá degnum fyri vera við.

### Eisini venjingar

Umframt kappingina, so er eisini venjing á skránni, har tær føroysku genturnar sleppa at venja saman við einum av teimum bestu liðunum í heiminum. Eisini hetta verður gjørt fyri at fimleikurin í Føroyum skal hava eitt so gott støðið at byrja á, sum gjørligt.

Í Estlandi er sera kalt hesa ársins tíð, og tí hava genturnar pakka nærum hvørt ullaplagg í skápinum at hava við, tí hallirnar, ið vant verður í har yviri eru ikki hitaðar á sama hátt sum hallir her, so tað verður eisini ein uppliving fyri genturnar.

Umframt íðkararnar, so eru eisini tveir føroyskir dómarar við til kappingina. Fyri at gerast góðkendur altjóða dómari innan estetiskan fimleik skulu dómarar á trý skeið, og millum hesi skeið skulu tær døma altjóða kappingar. Fleiri føroyskir dómarar vóru í januar mánað á skeið í Spaniu, og av hesum eru tvær, sum eru við sum dómarar í Tallin.

# Todi skoraði fyri Start

**Todi Jónsson upplivdi eitt sindur av hvørjum, tá ið hann spældi við í venjingardysti ímóti Malaga B. Fyrsta varð hann stútaður av mótstøðumanni, og so skoraði hann ársins fyrsta mál fyri Start**


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Todi Jónsson var annar av málskjúttunum, tá ið Start í gjár vann venjingardyst ímóti Malaga B í Spania. Dysturin endaði við úrslitinum 2-0 til Start, og Todi skoraði seinna málið.

Todi hevur verið nakað plágaður av bruna í hælsinuni seinastu mánaðirnar, og fyrr í vikuni hvíldi hann seg frá einari venjina á venjingarleguni hjá Start í Marbella. Todi sat eisini á beinkinum frá byrjan av dystinum ímóti Malaga B, men í hálvleikinum kom hann inn. Tá var støðan 1-0 til Start.

Sponsku spælararnir spældu hart, og teir fóru við hvørt út um mark. Heimasíðan hjá Start skrivar, 10 minuttir eftir hálvleikin fekk ein av spælarunum hjá Start harða viðferð frá málmanninum hjá Malaga, og tá ið Todi Jónsson skuldi hjálpa liðfelaganum var hann stútaður av einum sponskum spælara. Dómarin gjørdi einki við hendingina.

10 minuttir fyri tíð skoraði Todi Jónsson til 2-0. Eitt innlegg kom inn í brotsteigin, og har var Todi fyrstur og skallaði bóltin í málið.

### Vil verða toppskjútti

Málið, sum Todi skoraði mikudagin, er tað fyrsta fyri Start í ár, men Todi hevur gott mót um at gera fleiri mál fyri norska felag sítt.

– Eg haldi meg hava tað, sum skal til fyri at gerast topsskorari í Tippuliguni í ár, sigur 34 ára gamli Todi Jónsson við blaðið Fedrelandsvennen.

Start hevur ikki havt toppskjúttan í norskum fótbólti seinastu 16 árini.

– Tað hevur nógv at siga fyri eitt topplið, at tað hevur ein málskjútta, sum liðið kann líta á. Eitt lið kann koma langt, um tað hevur ein dystarvinnandi málmann og álopsspælara. Hesir báðir spælararnir kunnu avrika nógv, tá ið liðið hevur tað trupult í einum dysti, og tað er við slíkum spælarum, at tú kanst vinna gull, sigur Todi Jónsson.

Hann sær bert ein trupulleika fyri framman, og tað er brunin í hælsinuni.

– Eg má helst spæla við pínu í hælsinuni alt kappingarárið. Tað er einki at gera við tað. Tað gongur væl at spæla, men eg fái neyvan vant á hædd við liðfelagarnar gjøgnum alt árið, sigur hann.

Venjarin hjá Start hevur stórt álit á Toda.

– Todi er ikki í toppformi enn, men hann hevur avgjørt potentialið til at gerast toppskjútti í Norra, sigur Tom Nordlie við Fedrelandsvennen.



*– Eg haldi meg hava tað, sum skal til fyri at gerast topsskorari í Tippuliguni í ár, sigur Todi Jónsson, sum mikudagin skoraði sítt fyrsta mál fyri Start í ár*

## Súni smáskaddur

Tað er ikki vist, at Súni Olsen er førur fyri at spæla í næsta dystinum hjá AaB, sum verður ímóti SønderjydskE. Súni er ein av spælarunum hjá AaB, sum stríðist við ein skaða, og mikudagin vandi Súni ikki við liðfeløgunum. Súni hevur toygt ein vødd í lærinum, og hóast talan er um ein minni skaða, er óvist, um hann fær spælt um vikuskiftið, skrivar heimasíðan hjá AaB.

## Sleppa ikki í gongd

Tað gongur illa at fáa gongd á donsku 1. deild í fótbólti. Ætlanin var, at byrjast skuldi seinasta vikuskiftið, men teir flestu dystirnir vóru útsettir orsaka av frosti. Soleiðis er eisini hetta vikuskiftið, og hvørki Frem ella Fremad Amager, har føroyskir spælarar spæla, sleppa at spæla landskappingardyst. Ístaðin fyri Frem at spæla venjingardyt ímóti Herfølge, meðan Fremad Amager fer at spæla venjingardyst ímóti Brønshøj.

## FSF eykaaðalfund

Fótbóltssamband Føroya lýsir nú eykaaðalfundi tann 6. mai. Á skránni verða broytingar í kappingarreglunum fyri fótbólt og nýggjar lógir fyri Fótbóltssamband Føroya. Hetta eru mál, sum ikki vóru tikin við á aðalfundinum hjá FSF, men hava bíðað til ein eykaaðalfund.

## Johansson hongur í

Lennart Johansson, sum er forseti fyri europeiska fótbóltssambandið UEFA, bíðar við eini endaligari avgerð um, hvørt hann gevst sum forseti næsta ár ella ikki. Tað er komið fram, nú UEFA hevur ársaðalfund í hesum døgum. Eitt av týðandi málunum á fundinum er, at G14 feløgini, sum eru tey ríkastu feløgini í Europa, eru farin at fylla meira og meira í fyriskipanini av fótbóltskappingum, og nú vil UEFA enn einaferð staðfesta, at tað er UEFA, sum er hægsti myndugleiki innan fótbólti í Europa.

– Við øllum ófriðinum, sum eru rundan um fótbóltin í løtuni, vil eg gjarna fylgja við gongdini, sigur 76 ára gamli sviin Lennart Johansson.

Umboð fyri føroyska fótbóltssambandið eru við á aðalfundinum hjá UEFA, sum verður hildin í Budapest.